# DONG metir Føroyar sum eitt kjarnuøki

**OLJUFELAG – Vit síggja økið millum Føroyar og Hetland sum eitt samanhangandi umráði. Vit hava fingið góð úrslit vestan fyri Hetland og fara nú at brúka ta vitanina á føroyska landgrunninum sigur Søren Gath Hansen, stjóri.**

åJan Müller

Herfyri vitjaði trý umboð fyri danska orku- og gassfelagið DONG Energy í Føroyum. Tað vóru tríggir av oddamonnunum í hesum danska gassrisanum, nevniliga Søren Gath Hansen, Søren Andersen og Jan Terje Edvardsen, sum allir arbeiða við antin leiting ella framleiðslu.

Søren Gath Hansen stendur á odda fyri leiting og framleiðslu hjá felagnum og hevur vitjað í Føroyum fleiri ferðir, síðani felagið gjørdist partur av forkanningunum miðskeiðis í 90 árunum. Hann sigur, at orsøkin til vitjanina hesaferð var fyrst og fremst at vísa andlit og tosa við Jarðfeingi og umboð fyri politisku skipanina, her løgmann og oljumálaráðharran. Eisini fyri at hitta umboð fyri Statoil, sum Dong hevur tætt samstarv við á føroyska landgrunninum.

Dong, sum hevur verið partur av fýra loyvum, hevur gjørt av ikki at halda fram við tveimum av loyvunum í Føroyum, men heldur at brúka alla orkuna uppá tvey loyvi, sum felagið framvegis er partur av á landgrunninum. Hetta merkir ikki, at felagið er minni áhugað í Føroyum, tí tað er ein natúrlig gongd, tá loyvi ganga út, at tú velur at raðfesta og harvið eisini velur frá leggur Søren Gath Hansen dent á. Hann vísir eisini á, at hetta skal eisini síggjast sum ein lutur í tí altjóða virksemi, sum felagið er partur av. Tað var ma. hetta umboðini fyri felagið greiddu føroyskum myndugleikum frá undir vitjanini.

Uppá fyrispurning um tað tó ikki er eitt negativt signal at senda út, tá felagið tekur seg út úr tveimum av fýra loyvum sigur Søren Gath Hansen, at tað er heilt vanligt fyri oljufeløg, sum hava fleiri loyvi í einum øki, at man eftir eina tíð velur at raðfesta. Hetta hendir eisini í Danmark og aðrastaðni, har Dong er virkið. – Vit royna at savna allar kreftirnar um tey loyvi, sum vit meta hava størstu framtíðina. Dong er sera virkið vestan fyri Hetland og ætlar sær eisini at vera virkið eystan fyri Føroyar í framtíðini. Vit síggja nevniliga alt hetta umráðið sum eitt samanhangandi øki og vilja so leggja okkum eftir at troyta teir møguleikarnar, sum vit halda eru bestir.

## Kjarnuøki

Jan Terje Edvardsen, sum stendur á odda fyri altjóða leitingini hjá DONG, minnir á, at teir hava borað tveir brunnar í Føroyum, Marjun og Brugduna. – Teir kanningarhættirnir vit royndu har vístu seg ikki at virka nóg væl, og nú fara vit so at brúka aðrar kanningarhættir í teimum báðum loyvunum vit hava eftir í Føroyum.

– Hvussu stóra raðfesting hevur Føroyaøkið í tykkara samlaðu portefølju:

– Tá vit tosa um at gera íløgur ymsa staðni í heiminum, so síggja vit økið vestan fyri Hetland og økið eystan fyri Føroyar sum eitt øki, tvs. sum eina og somu provins, sum so eisini er eitt av okkara kjarnuøkjum. Vit hava havt sera nógv virksemi á bretskum øki, og vit koma eisini til at bora fleiri brunnar aftrat við Føroyar. Jan Terje Edvardsen vísir á, at teir fara at bora ein brunn saman við Statoil, møguliga í 2012 og møguleiki er eisini fyri, at tað koma fleiri aftrat hesum.

## Góð úrslit vestan fyri Hetland

Søren Andersen, sum stendur á odda fyri leitingini hjá DONG í Stórabretlandi, sigur:

– Vit síggja økið vestan fyri Hetland sum eitt sera áhugavert umráði, har vit hava fingið fleiri góð úrslit seinastu árini. Hetta er nakað, sum vit vilja byggja víðari á og sohvørt sum økini gerast meira búnað – frá at umfata kanningar í einum frontierøki – eru vit nú komin hartil, at hesi øki eru meira nær og náttúrlig. Í Føroyum eru vit tí eisini farnir at leggja okkum meira eftir teimum "playum", sum longu eru kend í bretskum øki. Tvs. at vit fara nærri markinum og burtur frá økjum við tjúkkum basaltløgum, sum liggja longur inni á føroyska landgrunninum.

## Kolvetni í næsta brunninum

– Tað eru gingin 10 ár, síðani fyrstu loyvini vórðu latin at leita eftir olju og gassi við Føroyar. Enn er einki lønandi fund gjørt. Hvussu leingi skulu føroyingar bíða eftir, at eitt nú DONG fer at gera eitt lønandi fund?

Søren Gath Hansen: – Vit vóna at raka við olju og gass, tá vit bora næsta brunnin um gott og væl eitt ár. Tað er sera dýrt at bora á djúpum vatni við Føroyar og tí leggja vit okkum eftir økjum, har vit við okkara kompetansu meta, at møguleikin at finna nakað er til steðar. Men eg má endurtaka tað vit søgdu í 1994, tá vit komu til Føroya, at hetta er ein bransja, sum krevur tol, tí tað kann ganga long tíð frá tí tú byrjar tínar kanningar, til olja verður funnin – og ikki minst í økjum, sum enn eru so nýggj og ikki nógv væl búnað við neyðugu kanningunum. Vit mugu taka ta tíð tað tekur til at loysa knútin, "bryde koden", sum Søren málber seg.

Hann sigur víðari, at søgan og royndirnar vestan fyri Hetland hava eisini lært okkum, at tað kann ganga long tíð, uttan at man finnur nakað fyri so knappliga at síggja úrslit. Tað er líka sum at kunna finna tann modellin, sum er tann rætti og virkar og síðani arbeiða víðari har frá. Og tað er hetta vit royna við Føroyar, har vit eisini trúgva uppá, at vit kunnu flyta okkara royndir vestan fyri Hetland til Føroyaøkið. Tí hava vit nú valt at fokusera meira miðvíst uppá tey øki í Føroyum, sum líkjast hepnu økjunum hinumegin markið.

*jan@sosialurin.fo*



*DONG leiðslan vitjar á Jarðfeingi.*